# TORRADAGAR Í KLAKSVÍK

## fríggjad. 18. febr.

**Húsið**
**Nýggjur í Arbeiðsloysisskipanini?**
Fríggjamorg. 18. febr. kl. 10-12
Arbeiðsloysisskipanin kallar øll ung í Norðoyggjum millum 16 og 25 ár inn til fund í Húsinum. Endamálið við fundinum er at varpa ljós á allar teir møguleikar, ið eru í skipanini, og at kenna tað fantastiska tilfeingi, vit eiga í ungdóminum, fyri á tann hátt at vegleiða tey rætt.
Øll kunnu gerast arbeiðsleys, men avbjóðingin er ikki at missa mótið. Arbeiðsloysisskipanin gevur tær nógvar møguleikar. T.d hava vit ein lestrarvegleiðara tilknýttan, sum kann vegleiða teg, um tú hevur hug at útbúgva teg.
Vit hava eina nýggja starvsvenjingarkunngerð, sum kann lata nakrar dyr upp, vit bjóða skeið av ymiskum slag o.s.fr. Tað er tó týdningarmikið, at tú sjálv/ur tekur ábyrgdina. Set teg í samband við okkum, og vit vegleiða teg fegin. Vit gleða okkum at síggja teg.



**Konsert við Nightingale String Quartet í Skúlanum við Ósánna**
Fríggjakv. 18. febr. kl. 19.30
Hetta er donsk strúkikvartett við ungum og evnaríkum kvinnum. Kostnaður 100 kr.
*www.nightingalestringquartet.com*



**Sangløta við Betesdakórinum**
Fríggjakv. – 18. febr. kl. 20.30
Betesdakórið bjóðar inn til sang- og hugnaløtu í Betesda. Sungnir verða í høvuðsheitum lættir kórsangir, stuðlað av solo- og bólkasangi. Millum sangirnar verða stuttar lýsingar. Aftanásangløtuna verður ein kaffimunnur við køkum afturvið.

## leygard. 19. febr.



**Matiné í Christianskirkjuni**
Leygarmorg. 19. febr. kl. 11
Klaksvíkar Hornorkestur spælir úr "Reyðu Bók" Jóhanna Johannesen, spælir løtt orgulstykki á urgu. "Reyðu Bók" eru kendir sálmar, sum verða nýttir í Onglandi, men mangir hesir eru eisini kendir hjá okkum. Reyðu Bók verður ofta nýtt sum upphiting hjá hornorkestrum, sum setur krøv til lungur, fraseringar og varravenjingar í spæli. - Allir sálmarnir í "Reyðu Bók" eru kendir, fløvandi og serliga væl egnaðir til hornorkesturspæl - ikki minst í Christianskirkjuni.
Tá ið urgan eisini sleppur at leika, so er ein góða matiné vís.



**Torra-heilsurenning**
**Klaksvíksvegur – niðanfyri Klaksvíkar Sjúkrahús**
Leygard. 19. febr. kl. 14
Auðunn Konráðsson, formaður í Heilsu- og Umhvørvisnevnd býráðsins setur Torra-heilsurenningina í gongd. Teinurin er 4,1 km. Talan er um heilsurenning, og tí er ikki neyðugt við tilmelding. Øll eru hjartaliga vælkomin at luttaka, tvs. renna og/ella ganga.
Rutan gongur út eftir Klakvíksvegnum, Stoksoyravegnum, síðani heim eftir Torvgøtu niðan til Víkavegin, eftir Víkavegnum, Vágsheygsgøtu til Fosságøtu, har snarað verður oman til Uppsalagøtu, síðani oman í Vágstún, og so út eftir Klaksvíksvegnum, út til Sjúkrahúsið, har málið er.
Vegirnir verða ikki avsperraðir, og tí verður heitt á luttakararnar um at vísa stórt varsemi, meðan runnið/gingið verður.
Gott hevði verið, um luttakararnir vóru í gulum vesti.
www.treysti.fo

**Heilsucafé á Klaksvíkar Sjúkrahúsi**
Leygard. 19. febr. kl. 14-18
Kl. 14.30 Heilsucaféin verður sett í kantinuni av Aksel V. Johannesen, landstýrismanni.
Kl. 15.30-17.00 Niklas Heri Jákupsson heldur fyrilestur "Út við strongd - Inn við lívsgleði""
Fyrilesturin er almennur og øll eru vælkomin.
Fyrilesturin er í felagshøllini.
Millum kl. 14-18 verður høvi at mála blóðtrýstið, blóðsukurið, gera eina konditest og at mála BMI. Høvi verður eisini at tekna seg sum blóðdonor, og at bíleggja tíð til lungnafunktiónskanning.

**Hugnakvøld við sjómansvísum í Skálanum**
Leygarkv. 19. febr. kl. 19.30
Klaksvíkar Dansifelag bjóðar øllum til hugnakvøld.
Á skránni verður felagssangur og kalt borð.
Meðan etið verður, syngja luttakararnir gamlar og nýggjar sjómanssangir og vísur. Harmonikan spælir undir, og inni millum sangirnar verður onkur stutt hugleiðing um sjólívið. Eftir borðhaldið verður farið uppá gólv eina løtu, har m.a. Vaagen og Brótatáttur verða kvøðin.
Kostnaður fyri kvøldið er 100 kr.
Tilmeldingin fer fram hjá Heina Mohr á tel. 223011 ella hjá Jónleifi Johannesen á t-posti: jonleif.johannesen@skulin.fo



**Leikar í lund presenterar:**
**Tónarák í Torratíð**
**Uni, Lív og Tróndur hava konsert í Leikalund**
Leygard. 19. febr. kl. 21
Hetta er ein nýggj trio, sum framførir frískan blues- og fólkatónleik. Tónleikur, sum hevur verið nógv frammi í fjølmiðlunum.
Dyrnar verða lætnar upp kl. 20.
Atgongumerki á 100 kr. kunnu keypast í Leikalund ella bíleggjast á 457151.

## sunnud. 20. febr.

**Gongutúrur niðan á Lokkan**
Um viðrar skipar Norðoya Gongufelag fyri spennandi gongutúri niðan á Lokkan sunnudagin 20. februar kl.10.
Túrurin kemur at taka áleið 5-6 tímar. Kostnaður: 100 kr. pr. pers. - Fyrivarni verður tikið fyri broytingum!
Tilmelding neyðug: Norðoya Kunningarstova, tel. 456939 ella á info@klaksvik.fo - Meiri fæst at vita um túrin við at venda sær til Norðoya Kunningarstovu.

klaksvíkar kommuna

Klaksvíkar Kommuna - N. Pálsgøta 32 - FO-700 Klaksvík - Tel. 41 00 00 - Fax. 41 00 01 - klaksvik@klaksvik.fo



# Dansa, kvøða og syngja í Skálanum

**TORRADAGAR Leygarkvøldið ber til at syngja sjómanssangir og -vísur í Skálanum. Hetta er eitt nýtt tiltak, og gleða fyrireikararnir seg til at vera partur av Torradøgum í ár.**

Hugnakvøldið byrjar klokkan 19.30. Tá verður farið til borðs, og við borðið syngja tey hópin av kendum og nakrar minni kendar sjómanssangir og vísur. Jóanes Johannesen úr Dali fer at spæla undir á harmoniku.

Í millum sangirnar verður høvi at bera fram onkra søgu. Sólvit Simonsen av Sandi, ið hevur siglt nógv saman við klaksvíkingum, kemur við sínum eyðkenda skemtiliga frásøguhátti at siga frá.

Eisini kemur Jógvan Ravnsfjall at greiða frá áhugaverdum søguligum viðurskiftum í siglingarsøgu okkara. Talan er um stuttar frágreiðingar, tí sangurin skal verða tað berandi hetta kvøldið.

Eftir borðhaldið verður farið uppá gólv. Tey fara at kvøða um Vaagen, og um lagið er gott, halda tey á við eitt nú Brókatátti og øðrum.

Neyðugt er at tekna seg til titakið á telefon 223011 ella hjá

Jónleifi Johannesen á telduposti:
*jonleif.johannesen@skulin.fo*